## UTTAN ÚR HEIMI

## Verkfall ímóti sparingum

Amerikanska bilaverksmiðjan General Motors hevur boðað frá stórum sparingum á verksmiðjunum, sum fyritøkan hevur í Evropa.

Avgerðin hevur fingið øði í fólk, og umleið 50.000 starvsfólk á teimum evropeisku deildunum hjá General Motors eru farin í verkfall fyri at mótmæla avgrðini. Fyrrakvøldið vóru stórar mótmælisgongur utan fyri deildirnar í týsku býunum Rüsselheim og Bochum. Har verða Opel-bilarnir gjørdir, men mótmælisgongur vóru eisini uttan fyri deildirnar hjá General Motors í Belgia, Fraklandi, Pólandi, Portugal, Bretlandi, Svøríki, Eysturríki og Ungarn.

Leiðslan í General Motors sigur, at hon ætlar at spara 3,7 milliardir krónur á deildunum í Evropa, og tað fr at hava við sær, at 12.000 starvsfólk mugu fara til hús.

## Drongur skjeyt foreldrini

Mánadagin skjeyt ein 13 ára gamal drongur í russiska býnum Talmenka foreldur síni, eftir at pápi hansara hevði bukað hann.

Drongurin hevur greitt løgregluni frá, at hann hevði fingið ringan karakter í skúlanum. Tað fekk øði í pápan, sum bukaði hann. Hetta var ikki fyrstu ferð, at hetta var hent, men hesaferð var pápin harðligari, enn hann plagdi at vera, hevur drongurin greitt frá. Morgunin tók hann byrsuna hjá pápanum, sníkti seg inn í kamarið, har foreldrini svóvu, og skjeyt tey. Undir avhoyringunum segði drongurin, at hann hevði ætlað at tveta líkini í eina á, men tá hann ikki orkaði at draga tey út úr húsunum, fjaldi hann tey í einum skápi. Tá 26 ára gamla systir hansara kom at vitja um kvøldið, fann hon líkini.

Russisku myndugleikarnir siga, at løgreglan viðgerð málið sum eitt drápsmál, men at tað er ikki vist, at drongurin verður ákærdur fyri dráp. Hann skal mentalkannast, áðrenn støða verður tikin, siga myndugleikarnir.

## Drápsmaður funnin

Í fleiri ár hava indisku myndugleikarnir leitað eftir tí umleið 60 ára gamla brotsmanninum Koose Muniswamy Veerappan, og teir høvdu lovað 60.000 krónur í finningarløn, bleiv hann avdúkaður.

Mánakvøldið eydnaðist tað endiliga løgregluni at finna brotsmannin. Sambært løgregluni endaði tað við einum skotbardaga, og tá løgeglumenninir seinni tóku seg fram, funnu teir líkið av Koose Muniswamy Veerappan.

Tann 60 ára gamli brotsmaðurin hevur argað indisku myndugleikarnar í fleiri ár. Hann byrjaði sítt brotsmannavirksemi við at skjóta fílar, men seinni fór hann at beina fyri fólki, og indisku myndugleikarnir halda, at hann hevur ábyrgdina av meiri enn 100 morðum. Fyri fýra árum síðani gjørdist hann kendur um allan heim, tá hann burturflutti ein kendan indiskan filmsleikara, sum bleiv hildin gísli í 108 dagar.

Tað vóru kortini ikki allir indarar, ið mettu hann sum ein brotsmann. Summi bóru hann saman við Robin Hood.

## Horvin í Alpunum

Myndugleikarnir í Eysturríki eru givnir at leita eftir tí 67 ára gamla týskaranum Simon Helmut. Í síðstu viku fór hann á fjøllini og skuldi koma aftur fýra dagar seinni, men tá hann ikki var komin sunnudagin, vórðu bjargingarlið send at leita. Tey funnu hann ikki, og mánakvøldið góvust bjargingarmenninir at leita.

Simon Helmut og kona hansara, Erika, gjørdust heimskend í 1991, tá tey av tilvild komu fram á eina sera væl varðveitta mumiu frá bronzuøldini. Tey funnu hana í fjøllunum í Suður-Tyrol tætt við markið ímillum Eysturríki og Italia. Seinni fóru tey bæði londini at stríðast um, hvør átti mumiuna. Í seks ár var hon á einum savni í Eysturríki, men í 1997 bleiv hon flutt til Italia.

Mumian er 5300 ára gomul og hevur givið granskarum fleiri týðandi upplýsingar um lívið í bronzuøldini, skrivar VG.

# Bush forseti og Edwards varaforseti

**Endar forsetavalið í USA javnt, er tað ikki óhugsandi, at republikanararnir og demokratarnir fara at býta valdið**




*Hetta er ikki óhugsandi - republikanarin George W. Bush sum forseti og demokraturin John Edwards sum varaforseti*

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meðan fólk kring heimin bíða við spenningi eftir amerikanska forsetavalinum, stúra amerikanskir valserfrøðingar, at úrslitið kann elva til uppaftur størri iva og stríð enn fyri fýra árum síðani, tá nakrar fáar hundrað atkvøður avgjørdi valið.

Atkvøðugreiðslan, sum byrjaði í Florida og nøkrum øðrum statum mánadagin, hevur longu avdúkað fleiri trupulleikar, og bæði republikanaarnir og demokratarnir hava sent sakførarar til Florida at fyrireika seg til at leggja sak, er úrslitið teimum ikki til vildar.

Summir valserfrøðingar siga, at tá valið er so javnt, kann tað væl henda, at tað fer at standa á jøvnum ímillum George W. Bush og John Kerry, soleiðis at teir fáa 269 valmenn í part. Tað hendir, um veljararnir atkvøða sum seinast, men at demokratarnir vinna tveir av teimum smáu statunum frá republikanarunum.

Hendir tað, skal Umboðsmannatingið velja forsetan, og Senatið skal velja varaforsetan. Í Umboðsmannatinginum hava republikanararnir meirilutan, so har verður Bush valdur, men vinna demokratarnir meirilutan í Senatinum aftur, verður John Edwards varaforseti hjá Bush.

Ein bók, sum júst er útkomin í USA, staðfestir, at amerikanska valskipanin er ótíðarhóskandi, og at fólk hava fleiri møguleikar at snýta myndugleikarnar, hava tey hug til tess. Eitt nú verður víst á, at í 33 av teimum 50 statunum krevja valmyndugleikarnir ikki, at fólk skulu hava samleikaprógv við sær, tá tey skráseta seg sum veljarar. Harafturímóti sleppa fólk ikki at leiga ein film ella at leiga eitt kamar á einum gistingarhúsi uttan at vísa samleikaprógv.

Eitt nú hevur bókin eitt dømi um, at ein kvinna slapp at atkvøða tvær ferðir. Hon hevði skrásett seg sum veljara í sínum egna navni, men hevði harafturat skrásett seg sum veljara í navninum hjá mammuni. Mamman var deyð, men tað kannaðu myndugleikarnir ikki.

– Í USA ber til at vera politiskt virkin, eftir at ein er deyður, sigur John Fund, sum hevur skrivað bókina, og sum The Heritage Foundation hevur ivið út.

# Evropa verður nýggja yvirgangsmálið

**Síðani 11. september í 2001 er USA betur vart ímóti yvirgangi, og álop á amerikonsk mál í Irak hava ikki so stóran týdning longur. Tí veksur vandin fyri yvirgangi í Evropa**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing hjá tí viðurkenda stovninum International Institute for Strategic Studies í London.

Stovnurin sigur, at vandin fyri yvirgangi er framvegis sera stórur, og at talið á yvirgangsbólkum, sum virka í meiri enn einum landi, veksur í hvørjum. Kríggið í Irak hevur eggjað fleiri til at bjóða seg fram sum sjálvmorðsbumbumenn, og kríggið hevur eisini givið al-Qaeda eitt annað grundarlag fyri at halda fram við sínum virksemi, sigur IISS.

– Sjálvt um Osama bin Laden og Ayman al-Zawahiri hava avmarkað rásarúm, eru teir framvegis teir fremstu leiðararnir í einum heilagum kríggi. Síðani kríggið í Afganistan er leiðslan í al-Qaeda meiri fjøltáttað, og tí er tað truplari at halda eygað við henni, sigur stjórin í IISS, John Chapman.

Hann vísir á, at tann almenna uppfatanin er, at kríggið ímóti altjóða yvirgangi fer at vara eini 10 ella 15 ár, men sjálvur veit hann ikki, um tað ber til at vinna kríggið.

IISS sigur í frágreiðingini, at strong amerikonsk trygdartiltøk gera tað trupult hjá yvirgangsmonnum at søkja at málum í USA, og álopini á amerikanskar hermenn í Irak hava ikki so stórt hugsjónarligt virði longur, heldur hann. Tí mugu yvirgangsmenninir venda sær ímóti øðrum málum, og her stendur Evropa ovarlaga á dagsskrá teira.

Ein rættiliga stórur partur av teirri nýggju frágreiðingini hjá IISS snýr seg um Russland. John Chapman sigur við Reuters, at tað ber ikki til at fyrireika Russland ímóti yvirgangi, so leingi tann hernaðarliga útgerðin er avoldað, og so leingi trygdartænastan er so gjøgnumsúrgað av korrupsjón sum nú.

John Chapman vil ikki leggja eg út í amerikanska forsetavalið, men hann heldur, at verður Bush afturvaldur, kann tað fáa týdning fyri viðurskiftini í Miðeystri. Bush kann ikki stilla upp eina ferð afturat, og tí nýtist honum ikki at taka fyrivarni fyri, hvat teir sterku jødisku felagsskapirnir í USA halda um politikk hansara í Miðeystri, sigur stjórin í IISS.



# Nýggj fløga á veg



Knút Háberg Eysturstein, ið tey flestu munnu kenna sum tangentleikandi brillumannin úr bólkinum Gestir, gevur 2. november sína fyrstu solofløgu út

Talan er um fløgu, ið Knút hevur arbeitt við seinasta árið og innspælt saman við vinmanninum og coprodusaranum Allan Tausen. Upptøkurnar vóru gjørdar í bygdarhúsinum á Strondum og í Jak Zak Studio í Havn.

Tónleikurin er atmosferiskur singer/songwriter tónleikur við eitt sindur av sveimandi rocki, electronica og post rock blandaðum uppí. Tekstirnir eru bæði á enskum og føroyskum, og eru skrivaðir gjøgnum fimm tey seinastu árini.

Tað er plátufelagið Tutl, ið gevur fløguna út. Ungi listamaðurin Bruno Mikael Eysturstein hevur gjørt myndir og tekningar til húsan, ið teir báðir Niels Arge Galan og Uni Árting hava sniðgivið og sett saman.

### Kemur út í Sveits samstundis

Eitt sermerkt við fløguni "Havsglóð" er, at hon verður givin út í Føroyum og í Sveits um somu tíð. Fløgan verður nevniliga til sølu í býnum St. Gallen sum liggur norðaliga í Sveits.

Fløguhandilin Ton-Art, sum er einasta umboð fyri Tutl í Sveits, og sum hevur breitt úrval av Tutl útgávum, fer at selja fløguna.

Tað er Føroyavinurin Felix Van Der Berg ið hevur fingið samstarvið í lag. Felix stendur fyri innflutningi og útbreiðslu av føroyskum tónleiki í Sveits saman við eigaranum av Ton Art, Roger Rey.

Hesir báðir gera eitt stórt kunningar arbeiði fyri føroyskan tónleik í økinum kring St. Gallen, har tað búgva umleið 500.000 fólk.

### Føroyskur tónleikur væl móttikin

Í september mánaði var Høgni Lisberg og vitjaði í Sveits saman við bólkinum hjá sær, har Knút eisini spælir við.

Høgni Lisberg er við at gerast eitt kent navn í Sveits. Fleiri greinar hava verið í sveisiskum bløðum, og løg av fløguni "Most Beautiful Things" eru javnan at hoyra í sveisiskum útvarpi. Høgni Lisberg Band spældu tríggjar konsertir, sum gingu avbera væl, á túrinum. Tað var eisini her, at avtalan kom í lag um at geva fløguna hjá Knút út samstundis sum her heima. Tískil verður nógv gjørt burturúr útgávudegnum í Sveits. Sveitsarar vísa seg at vera sera jaligir um føroyskan tónleik, og verður tað spennandi at frætta nærri hvussu hetta fer at ganga.

-eys-

Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming.................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo

FØROYA TELE

NÝGGIR VINNUMØGULEIKAR !

*Gevur altjóða skipaskráseting nýggjar vinnumøguleikar?*

Føroya Sjómansskúli skipar fyri
RÁÐSTEVNU
um **altjóða skipaskráseting** fríggjadagin 29. oktober.

Føroya Sjómansskúli
Maritime College